

Birgir Durhuus, nevndarformaður í Atlantic Petroleum og Ben Arabo, stjóri eftir aðalfundin í Havn í vikuni. Myndatøka Jan Müller/oljan.fo

# Spennandi tíð fyri framman hjá Atlantic Petroleum

**Jan Müller**

11.04.2014 - 09:57

Oljan.fo

Hóast framgongd í oljugoymslum og í loyvum, so royndist farna ár hjá Atlantic Petroleum ikki væl á øllum økjum. Hóast oljuframleiðslan gjørdist sum væntað, og oljuprísurin helt sær omanfyri 100 USD tunnuna, so vísti ársúrslitið hall. Høvuðsorsøkin skal finnast í stórum niðurskrivingum stavandi frá turrum brunnum í árinum. Tilsamans kostaðu miseydnaðar boringar felagnum 120 mió. kr. í 2013. Úrslitið er ikki nøktandi, tá brunnar ikki raka við olju og gass í rakstrarverdum nøgdum. Hetta kom fram í formansfrágreiðingini á aðalfundinum hjá Atlantic Petroleum í Havn í gjár.

Birgir Durhuus, nevndarformaður vísti á, at Atlantic Petroleum borar leitibrunnar innan fyri tað felagið megnar frá sjálvari framleiðsluni. Atlantic Petroleum hevur tey seinastu árini havt eina miðvísa ætlan at lata framleiðslu fíggja leiting eftir olju, soleiðis at felagið

kann vaksa um sínar oljugoymslur. Strategiin krevur, at felagið við ávísum millumbili finnur nýggjar oljukeldur. Hetta hevur higartil ikki eydnast, og er tað tí nú meir umráðandi enn nakrantíð, at felagið fær eydnuna við sær í komandi leitan. Atlantic Petroleum borar 3 brunnar afturat í 2014, harímillum er Brugdan II á føroyska landgrunninum.

Tey komandi tvey árini roknar Atlantic Petroleum við fallandi framleiðslu úr verandi brunnum. Tí er av týdningi, at farið verður varliga fram, til framleiðslan aftur hækkar í 2016, tá nýggju oljukeldurnar í Norðsjónum, fyrst Orlando og síðan Kells, koma í framleiðslu. Í 2017 væntar Atlantic Petroleum at framleiða umleið 5.000 tunnur um dagin úr verandi loyvum, tá hædd ikki er tikin fyir nýggjum uppkeypum ella nýggjum fundum.

Atlantic Petroleum er væl fyri sum oljufelag, peningurin á bók hevur ongantíð verið størri, oljugoymslurnar hava aldrin verið størri, og felagið hevur sera spennandi boringar fyri framman, sum kunnu økja virðini í felagnum avgerandi.

Tað er stórur munur millum bókaða virðið á Atlantic Petroleum uppá 600 mió. kr. og marknaðarvirðið uppá 350 mió. kr. Nevndin fekká aðalfundinumundirtøku at keypa upp til 10% av partabrøvunum, um nevndin tekur avgerð um hetta.

Aðalfundurin á Hotel Føroyum gjørdi eisini av at afturvelja verandi nevnd. Allir limir eru til val hvørt ár.

